## DAGSINS MEINING

# Yvirtøkulógin á Fólkatingi

Yvirtøkulógin ser samtykt á løgtingi og hevur nú verið til fyrstu viðgerð á Fólkatingi. Henda lóg verður av samgonguni mett sum stórt stig á sjálvstýrisleið, meðan andstøðan heldur tað mótsetta.. Lógin ásetir, at øll mál, sum ikki beinleiðis eru knýtt at suverenitetinum kunnu verða yvirtikin uttan víðari. Her verður ruddað væl og virðiliga upp í tí ruðuleika, sum tey seinastu mongu árini hevur valdað í spurninginum um, hvat ið kundi yvirtakast og hvat ið ikki kundi yvirtakast. Tað var ikki eitt samt løgting, sum atkvøddi fyri yvirtøkulógini, men tað var ein óvanliga stórur partur av løgtinginum og tí er tað ikki heilt burturvið at tala um eina breiða semju í hesum máli. Tað er eisini orsøk at halda, at lógin er eitt sera stig á sjálvstýrisleið.

Viðgerðin á Fólkatingi vísti, at stór undirtøka var í danska tinginum fyri yvirtøkulógini. Bert Eindarlistin og føroyski fólkatingsmaðurin Høgni Hoydal vóru ímóti lógaruppskotinum. Viðgerðin setti føroyska fólkatingsmannin í eina løgna støðu. Hetta tí, at tað er siðvenja, at føroyskir fólkatingslimir vanliga stuðla løgtingsins vilja í føroyskum málum á fólkatingi. Nú kom so annar føroyski fólkatingslimurin í ta støðu, at hann undir viðgerðini so at siga var noyddur at ganga í móti einum løgtingsmeiriluta. Hetta er sæð frá einum demokratiskum sjónarmiði sera ivasamt, og setir enn einaferð fokus á leiklutin hjá føroysku fólkatingslimunum. Hinvegin kann væl eingin siga Høgna Hoydal ringan fyri at ganga ímóti einum løgtingsmeiriluta í júst hesum máli, tá hugsað verður um ta støðu, sum flokkur hansara hevur tikið í málinum um yvirtøkulógina. Annað er so, at henda støða Tjóðveldisfloksins veruliga má vekja undran, tí sambært hin føroyska fólkatingsmannin, fyrrverandi løgmann Annfinn Kalsberg er yvirtøkulógin skorin eftir leisti, sum undanfarna samgonga var samd um. Mótstøðan hjá Tjóðveldisflokkinum og hjá Miðflokkinum kann tí tykjast at vera meira taktiskt grundað enn grundað á veruliga andstygd fyri hesi loysn.

Nú er eftir hjá donsku politisku skipanini at fáa hetta mál avgreitt, so friður verður á hesum øki heima í Føroyum. Tá yvirtøkulógin er avgreidd, eigur landsstýrissamgongan at fáa samtykt nakrar yvirtøkur, so lógin kann roynast i verki. Síðan er at fara til verka og seta í verk øll tey mongu mál, sum eru sett upp í samgonguskjalinum. Her liggur nógv á láni. Farið til verka, leggið eina strategi við nøkrum itøkiligum málum fyri øll týðandi samfelagsøki. Tá ið yvirtøkulógin er endaliga avgreidd frá danskari síðu, er eingin umbering fyri ikki at reka dagsins politikk, soleiðis sum hesin er niðurfeldur í samgonguskjalið. Tað er bara at fara tilverka og tað skuldi ligið væl fyri, tí samgongan hevur stuðul frá meginpartinum av føroysku veljarafjøldini.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Aftursvar til formannin fyri Starvsmannafelagið

**Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag**

**Føroya Arbeiðarafelag**

**Havnar Arbeiðsmannafelag**

Vit ætlað okkum ikki út í nakað alment kjak við onnur fakfeløg, men tær viðmerkingar, sum formaður Starvsmannafelagsins er komin fram við í fjølmiðlunum í samband við sáttmálasamráðingar okkara skulu ikki standa ósvaraðar.

Formaðurin fyri Starvsmannafelagið róði í sjónvarpinum m.a. uppundir:

- at undirritaðu feløg høvdu latið verkfallsrættin frá okkum,
- at limir okkara við semjuni fara at verða fyri einari reallønarlæking og
- at vit saman við arbeiðsgevarasífðuni royndu at leggja okkum út í samráðingarnar á almenna arbeiðsmarknaðinum.

**Vit hava ikki latið verkfalsrættin frá okkum.**

Tað er ikki rætt, sum formaðurin róði uppunir, at vit hava latið verkfallsrættin frá okkum.

Tað sum vit hava avtalað er, at í einum 2-ára tíðarskeiði skulu nøkur arbeiði á sjúkuraktum alibrúkum verða undantikið møguligum verkfalli.

Hetta varð gjørt partvíst fyri at forða fyri lógarinntrivi á økinum og eisini fyri at medvirka til at alivinnan, sum er sera illa fyri, fær møguleika fyri at fóta sær aftur.

Nevnda avtala var partur av tí semju, sum partarnir á privata arbeiðsmarknaðinum hava gjørt, og tí er tað beinleiðis skeivt at skuldseta okkum fyri at hava latið verkfallsrættin frá okkum.

**Vit valdu at styrkja eftirlønargrunnar okkara.**

Tað undrar okkum, at formaðurin fyri Starvsmannafelagið alment fer út og greiðir frá, at semjan á privata arbeismarknaðinum fer at geva limum okkara eitt reallønarfall.

Formaðurin í starvsmannafelagnum veit, at limir okkara hava tørv á einum styrktum eftirlønargrunni og hetta kann gerast, antin við at arbeiðsgevararnir skulu økja um tey inngjøld, sum teir skulu gjalda til hesar skipanir okkara, ella at limirnir sjálvir skulu gjalda.

Vit kunnu staðfesta, at limir okkara yvir 2 ár fáa 3 % meira frá arbeiðsgevarunum, og vit valdu, eftir ynski frá fleiri av limum okkara, at lata hesar hækkingar fara til til eitt nú eftirlønarskipanir okkara.

Tað er ikki rætt, at limir okkara við hesum hava útlit fyri einari reallønar-lækking, tí um vit skuldu fylgja ynskjunum um at styrkja eftirlønarskipanir okkara, so høvdu vit tvey í at velja, nevniliga, at latað limirnar sjálvar gjalda (meira) til hesar skipanir, ella lata arbeiðsgevararnar gjalda. Vit valdu tað seinna, og tí sleppa limir okkara frá sjálvir at brúka størri part av løn sínari til eftirløn.

Vit fara staðiliga at stríðast fyri at limir okkara ikki dragna enn meira í mun til tey alment løntu

Formaðurin fyri Starvsmannafelagnum veit væl at tað eru limir okkara, sum halda vinnuhjólinum malandi og eru við til at halda hesum samfelag uppi. Tað eru limir okkara, sum hvønn dag stríðast í privatu útflutningsvinnu okkara, soleiðis at vit kunnu hava ráð til at hava eina góða almenna umsiting. At lønir ikki eru líka vita vit fullvæl, men tað kann ikki vera rætt, at hvørja ferð limir okkara fáa kr. 5,00 í lønarhækking, so skal tann alment lønti hava kr. 5,50 og meira og hetta hevur verið gongdini mongu seinastu árini, har øll feløg hava fingið somu prosentvísu hækking, men ikki somu hæking í krónum.

Formaðurin fyri Starvsmannafelagið skal tí vera fullvísur í at vit áhaldandi fara at stríðast fyri at lønargjógvin millum tey, sum starvast hjá landið og kommunum og limum okkara á privata arbeiðsmarknaðinum ikki framhaldandi skal breiðkast.

# Eru øll trúgvandi býtt?

**Jóhan Jógvansson**
*realist*

Svar til lesarabræv hjá Meinhard Jensen í Dimmu týskvøld 17/05-05

Tað fyrikemur mær sum Føroyar er væl á veg at verða heilavaskaðar av religiónsfanatikarum, ella fundamentalistum, sum standa og rópa halleluja Várharra og Jesus á hvørjum gøtuhorni. Tað er nærum ómøguligt at nýta nakran miðil uttan at verða heilavaskaður av hesum religiónsgreðingum. Tann frægasti av øllum er Svf, sum bara sendir fleiri andaktir, gudstænastur og møtir hvønn tann einasta sunnu- og halgidag.

Eg vil minna Meinhard Jensen á, at vit realistar, ella í tykkara eygum er tað kanska heidningar, eisini gjalda sjónvarpsgjald. Og tá tykkara halgidagar forða okkum at t. d. fara til arbeiðis, so mátti tað verið tað minsta at Svf gevur okkum okkurt við hald í veruleikanum at hyggja eftir, heldur enn at síggja onkran totalt heilavaskaðan samkomuleiðara standa á einum talarastóli og fáa eina almenna religións orgasmu.

Tað fyrikemur mær eisini løgi at tit standa og prædika um tolsemi, men hvørja ferð onkur hevur vaskað ein bil ein sunnudag, hildið eina talu har onkur samkyndur er til staðar ella sent eina púra óskilduga og eftir mínum tykki sera áhugaverda sjónvarpssendings so verður tað til tað reina samfelagskaos bara tí at tað ikki passar við tykkara fantasiverð við Gud og Budha og øðrum tvætli.

Eg loyvi mær at ivast í, um Meinhard Jensen hevði sett spurnartekin við trúvirði á keldunum í sjónvarpssendingini, um talan var um onkran annan fundamentalist, sum pástóð, at Jesus hevði grøtt túsund fólk í Afrika ella okkurt líknandi.

Eg vil eisini heita á øll fólk í Føroyum, sum framvegis hava beinini á jørðini, um at royna at stríðast ímóti hesum sjúkligu »kristnu«, sum bara ikki duga at halda teirra trúgv fyri seg sjálvi.

Til endans vil eg siga, at tað er veruliga býtt at fara at finnast at Svf fyri at teir senda eina sending við manglandi trúvirði. Tað er ikki Svf, sum hevur gjørt sendingina, og hon hevur minst líka høgt trúvirði sum Bíblian, ein elligomul bók, sum bestemt ikki er interesant longur. Lesið heldur Finnboga Ísakson o. l. og forrestin, Gud er ikki til.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.